# Fimm alternativ til minni **útlát**

Rákið hevur spurt Kára Mortensen, Cand. Scient. í lívevnafrøði/ støddfrøði, sum starvast á Jarðfeingi, um nakrar møguleikar at minka um útlátið heima við hús



*Kári Mortensen á Jarðfeingi staðfestir, at fíggjarliga skynsamasta íløgan viðvíkjandi útláti er at syrgja fyri at bjálva væl*

**Spar ein fimting við betri oljufýring**

Vilt tú halda fast við oljufýringina og minka um útlátið, so skalt tú síggja til, at oljufýringin virkar optimalt. Nýggjar oljufýringar eru nógv effektivari enn tær gomlu. Tað kann vera skilagott at fáa fakfólk at kanna, hvussu nógv orka fer til onkis, og hvat kann gerast fyri at minka um tað. Hetta kann spara meir enn ein fimting í oljunýtslu.

**Spar ein triðing við betri bjálving**

Effektivasta loysnin - serliga í eldri húsum - er at bjálva av nýggjum.

Hetta kann spara meira enn ein triðing av oljunýtsluni í nógvum húsum.

**Hitapumpur**

Verður farið til nýggjaru tøknina, er ein góð hitapumpa ein møguleiki. Fleiri teirra megna at avloysa oljufýringina. Tað eru fýra ymisk sløg av hitapumpum:

**Luft til vatn:** Ein loysn við hitapumpum er luft til vatn hitapumpan, sum avloysir oljufýringina. Enn vita vit ikki, hvussu longi hesar hitapumpur halda í føroyska veðurlagnum, men íløgan kann helst vinnast inn aftur eftir 10 árum, um oljuprísurin er oman fyri sjey krónur literin.

**Jørð til vatn:** Jarðarhiti er eisini ein møguleiki. Fyrimunurin við hesum pumpum er, at tær ikki slítast av veðri. Heldur ikki eru tær til ampa fyri onnur, tí tær hvørki síggjast ella hoyrast av tí, at uttanduraparturin er undir jørð. Tað er hinvegin ein rættiliga stór íløga, sum vinnur seg inn aftur eftir eini 15 árum.

**Sjógv til vatn:** Har sum bygningar liggja við sjóvarmálan ber til at brúka sjóhita til upphiting. Royndir verða gjørdar við hesum í Føroyum í løtuni, og væntast kann, at príslegan og úrtøkan verður á sama støði sum jarðarhiti.

**Luft til luft:** Enn eru vanligastu hitapumpurnar í Føroyum luft til luft. Tær flestu hita luftina í húsinum og ikki brúksvatnið. So tær megna ikki at avloysa oljufýringina. Tær kosta ikki so nógv og vinna seg inn aftur í livitíðini.

**Vindmyllur**

Smáar vindmyllur eru eisini ein møguleiki sum ískoyti til oljufýring.

**Sólfangarar/Sólsellur**

Sólfangarar eru enn eitt alternativ, sum kunnu vera eitt ískoyti til heitt vatn og upphiting. Sólsellur, sum framleiða elektriskan streym, eru ikki lønandi, tí tær framleiða ov lítið í føroyska umhvørvinum.

# Í uppreistri móti

Ólavur Frederiksen hevur gjørt av, at hann ongantíð aftur skal keypa olju. Og útlitini fyri, at tað fer at eydnast, eru rættiliga bjørt



Fyri fimm árum síðan keypti prentarin, elektrikarin og myndamaðurin Ólavur Frederiksen eitt nýtt heim til familjuna.

Hann hoyrdi í útvarpinum, at oljuprísurin var á veg upp, og hann setti sær fyri, at hann skuldi ikki rinda fyri olju meira.

– Eg vildi hava ein rokning fyri hita, sum ikki broyttist frá mánað til mánað. Tí hava eg og »luft til vatn« hitapumpan nú fýra ár á baki, fortelur Ólavur Frederiksen íðin, tá Rákið spyr hann, hví hann longu fyri trimum árum síðan gjørdi eina íløgu í eina dýra hitapumpu til húsini frá 70unum.

Umframt hitapumpuna gjørdi familjan nærum beinanvegin íløgur í sólfangarar at hita vatn við og í ein brenniovn, sum tó seinni varð seldur.

**Spara 1000 krónur um mánaðin**

Tað vóru tey fægstu, sum hildu nógv um hitapumpur, tá Ólavur Frederiksen fekk sær eina. Men nú gerast tær alt vanligari, og hetta undrar ikki Ólav.

– Eg havi fingið mær serligan elmátara til hitapumpuna, og hann vísir, at vit nýta 1100 krónur um mánaðin til hita. Hetta haldi eg vera væl sloppið, tí tað er so nógv minni enn grannin, greiðir Ólavur frá um hitapumpuna, sum hann sjálvur hevur sett til.

Vanliga nýta fólk um 2000 krónur í olju um mánaðin, so sambært upplýsingunum frá mátaranum á hitapumpuni er ein sparing á ein lítlan 1000 krónur seðil um mánaðin til tey sjey fólkini í húsunum.

**Er vorðin miljøaktivistur**

Men so fekk Ólavur Frederiksen blóð upp á tonna.

Sportur kom fyrst í at sleppa undan svingandi oljuprísum, og nú er tann spurningurin endiliga burtur.

Næsta málið er at sleppa undan at brúka olju yvirhøvur – millum annað við at framleiða el til bilin við einari vindmyllu.

Í hesum døgum er elektrikarin og myndamaðurin í fer við at seta eina serliga nýggja vindmyllu upp. Hon er eitt annað slag av myllum enn tað vanliga, tí hon er størri og hevur øðrvísi skap, og hon skal ikki bara hita húsini.

Fyri tíð síðan kom nevniliga fram, at elbilar dálka verri í Føroyum enn aðrir nýggir bilar, tí so stórur partur av streyminum frá SEV verður gjørdur úr olju. Tí fær Ólavur sær eina vindmyllu.

– Ætlanin er at fáa 220 volt út, so eg kann seta ein elbil til eisini, sigur Ólavur Frederiksen.

Víðari greiðir hann frá, at ætlanin er at keypa ein lítlan grønan elbil, sum skal avloysa bilin, sum konan plagar at koyra við.